# Nøkur orð um pensjónsaldurin

**Málið í stuttum**
Broytta aldurssamansetingin og hægri meðallivialdur krevur av okkum, at vit taka ábyrgd og laga fólkapensjónina til dagsins samfelag. Alternativið er lítil ella ongin pensjón og vána ella ongin røkt á ellisárum.

**Javnaðarflokkurin er upphavið til vælferðarsamfelagið** Tí er tað eisini uppgávan hjá Javnaðarflokkinum at framtíðartryggja vælferðarsamfelagið. Ongin annar flokkur hevur tað í síni stevnu. At í Føroyum skulu øll kunna liva væl – eisini tey, sum ikki komu í hendan heim til skorin klæði.

Fólkapensjónin varð ætlað teimum gomlu, sum høvdu strevast eitt langt og strævið arbeiðslív, ofta frá konfirmatiónsalduri. Við fólkapensjónini fingu tey gomlu fíggjarligt frælsi og rætt til hvíld tey allarsíðstu árini av æviskeiðinum. Fólkapensjónin kom sum ein universellur rættur, so tey gomlu ikki skuldu liva av eyðmýkjandi olmussum frá næstringum ella fátækrahjálp. Fólkapensjónin gav Føroya fólki ein virðiligan aldurdóm í fíggarligum frælsi.

Vit gerast alt fleiri gomul og lutfalsliga fá ung, sum um fá ár – longu um 10 ár - skulu mynda og rinda vælferðina fyri øll. Samfelagið fer av um tvøran – har tey fáu arbeiða hart og nógv og rinda skatt, meðan ein stórur hópur skal forsyrgjast og ikki rindar skatt til felagsskapin – ikki minst, tí at forskattingin av pensjónum hevur skeiklað haldførið í búskapinum. Vit mugu verða fleiri sum lyfta.

**Ger tína skyldu og krev tín rætt**
Tey, sum kunnu arbeiða, eiga at arbeiða. Tað er góður sosialdemokratiskur politikkur.

**Um at vilja tryggja vælfeðarsamfelagið:** At byggja, varðveita og menna vælferðarsamfelagið er ikki bara okkara høvuðsuppgáva.
Tað er sjálv orsøkin til, at Javnaðarflokkurin er til.
Hetta samfelag kom ikki av sær sjálvum – og tað yvirlivir heldur ikki av sær sjálvum.
Vit noyðast at gera smærri tillagingar viðhvørt, og vit noyðast at gera stórar broytingar viðhvørt. Annars er vandi fyri, at súlurnar undir vælferðarsamfelagnum ikki halda – og tað gongur í síðsta enda út yvir tey, vit eru sett í verðina at umboða. Tey, sum hava brúk fyri felagsskapinum, har vit eru sterk saman – solidarisk og sosial.

**Javnaðarflokkurin innførdi fólkapensjónina**: Og tað er einki dulsmál, at hetta var tað, sum gjørdi, at flokkurin líka síðani hevur verið ein stór og positiv kraft í føroyska samfelagnum.
Pensjónin var ein politiskur stórsigur og er í stóran mun okkara legitimitetur.
Tað eru hendar nógvar justeringar og broytingar í pensjónini síðani 1958 – og nú stendur aftur ein fyri framman. Talan er um meira enn eina tillaging.

**Fólkapensjónin er ein rættur:** Fakfelagssamstarvið spyr í fráboðan "Hvar eru rættindini hjá borgaranum?"
Vit siga: Borgarin hevur framvegis rætt til fólkapensjón, men fyri okkum, sum nú eru í 50-unum, verður tað tá ið vit verða 70. Gera vit onki, er vandi fyri, at ongin fólkapensjón verður yvirhøvir, tí tað verða ov fá at rinda inn.

**Um at taka ábyrgd:** Hetta er ein verulig broyting, sum ikki er populér. Eisini í okkara flokki eru ymiskar meiningar um hana.

Men broytingin er samtykt á floksleiðslufundum. Tí hon er neyðug.
Hon er ikki neyðug reint partapolitiskt her og nú. Og vit vinna ikki næsta val av henni. Men hon er neyðug fyri okkara búskap – og tí í síðsta enda fyri vælferðarsamfelagið. Vit sita við ábyrgdini, og eiga ikki at renna undan henni. Tí Javnaðarflokkurin eigur at sita við valdið, og hevur altíð tikið ábyrgd, eisini tá ið tað ikki var so populért.

**Um ábyrgdarleysu andstøðuna og forskattingina av pensjónum:** Tað er ikki so stuttligt at vera tey, sum taka ábyrgd. Men tað ger andstøðan á tingi ikki. Tvørturímóti. Í 2011 fóru tey undir at forskatta pensjónirnar, so vit bæði kravdu skatt frá teimum, sum rindaðu inn, og teimum, sum fáa pensjónina útgoldna. Hetta var ómetaliga ábyrgdarleyst, tí sum sum frá líður tornar seinna keldan, og tá samfelagið er lagað til verandi inntøkur, mugu komandi politikarar spara samsvarandi. Hetta merkir í stuttum, at um fá ár skulu BARA tey, sum eru á arbeiðsmarknaðinum – barnafamiljurnar – rinda inntøkuskatt. Vit onnur, sum tá verða pensjónistar skulu IKKI rinda skatt. Halda tit, at okkara børn fara at góðtaka tað?
At forskatta pensjónirnar er klassiskur “pissa í buksurnar” politikkur.

**Pensjónsaldurin er ikki ritaður í stein:** Javnaðarflokkurin ber fólkapensjónina og allar aðrar sosialar lógir í hjartanum. Tær skulu hvørki av- ella niðurlagast. Hækkingin av pensjónsaldrinum hevur sum mál at tryggja bæði pensjón og røkt til komandi pensjónistar. Pensjónsaldurin er

ikki ritaður í stein. Hann varð ásettur í 1958, tá ið fólk livdu nógv styttri enn í dag. Og fóru út at arbeiða um fermingaraldur.
Í dag liva vit í meðal í 19 ár eftir pensjónsaldur og sannlíkt 21 ár eftir pensjónsaldur í 2045. Sera, sera nógv arbeiða víðari aftaná 67 ára aldur. Hetta fegnast vit øll um.
Men vit koma ikki uttan um, at hetta skapar avbjóðingar, um vit ynskja at varðveita vælferðarstøðið.
Fyri 20 árum síðani vóru átta løntakarar fyri hvønn pensjónist. Í dag eru fýra. Um vit einki gera, so vera tvey fólk á arbeiðsmarknaðinum fyri hvønn pensjónist um 30 ár. Hóast vit tillaga pensjónsaldurin nú, verða pensjónistarnir lutfalsliga munandi fleiri enn nú. Men broytingin bøtir um lutfallið.

**At selja út av arvagullinum:** Onkur vil vera við, at nú avtekur Javnaðarflokkurin arvagullið. Fólkapensjónin er universell, tí ØLL hava rætt til hana. Skipanin kemur framvegis at fevna um ØLL, men pensjónsaldurin verður hækkaður til 70 ár. Soleiðis hava ØLL, sum verða 70 ár framvegis rætt til fólkapensjón. Við at laga fólkapensjónina til nútíðina TRYGGJAR Javnaðarflokkurin universellu Fólkapensjónina – eisini til komandi pensjónistar. Verður onki gjørt verður HVØRKI Fólkapensjón ella Ellisrøkt til komandi pensjónistar. Tað hevði verið ábyrgdarleyst.

**Vit eru longu ov sein:** Vit noyðast at styrkja samhaldsfesti millum ættarlið, so økti livialdurin ikki bara merkir, at fólk verða longri á pensjón, men, at tey eisini eru nakað longri á arbeiðsmarknaðinum.
Hesar broytingar skuldu verið gjørdar fyri fleiri árum síðani. Vit eru longu alt ov sein. Men tíverri hava vit ikki siðvenju fyri breiðum semjum í Føroyum. So vit, sum nú sita við valdinum mugu taka ábyrgd. Tí við verandi gongd verður hvørki peningur til pensjónir ella ellisrøkt til komandi pensjónistar. Gera vit onki, er ivasamt um tey, um tey, sum í dag eru 70 ár og gerast røktarkrevjandi um 10 ár, fáa virðilig ellisár. So skjótt gongur tað skeiva vegin í løtuni.

**Um samhaldsfesti:** Okkara vælferðarskipan, sum allir flokkar á tingi tíbetur eru samdir um at tryggja og menna, byggir á nøkur grundleggjandi prinsippir – nakrar aðalreglur, ella súlur – sum vit noyðast at virða, skulu allir føroyingar sleppa at liva í sama sosiala tryggleika, sum vit gera tað í dag. Lýti eru – treyðugt so - men yvirskipað er vit vónandi samd um, at vit liva í heimsins besta landi.

Men hetta er avgjørt ongin sjálvfylgja. Tað treytar ein miðvísan politikk, har samhaldsfesti er hjartaslátturin – har sosiala kontraktin ræður.

**Sosiala kontraktin**: er sentral í okkara vælferðarmodelli. Hon snýr seg um fleiri viðurskifti, men fyrst og fremst, at tey, sum kunnu arbeiða, skulu arbeiða og rinda skatt, soleiðis at vit, um ella tá ið vit gerast óarbeiðsfør, við røttum ryggi kunnu krevja okkara rætt. Hendan kontraktin fevnir um øll menniskju í Føroyum. At vit eru solidarisk, bæði millum landspartar, inntøkubólkar, kyn og aldur. Og ikki minst, at vit eru solidarisk millum ættarlið, so komandi ættarlið fáa somu ella betri kor at liva í. Gera vit onki við haldførið nú, verður hvørki pensjón ella røkt til komandi pensjónistar – longu um 10 ár! Tað er ábyrgdarleyst!

**Hvør verður trælur?**
Fakfelagssamstarvið sigur í fráboðan: "Ein stórur partur av fólkinum verður á henda hátt trælur á arbeiðsmarknaðinum, tí tað verður ein fíggjarlig vanlukka, um ein ikki megnar at arbeiða heilt til ætlaða 70-ára aldur."
Vit siga: Tey, sum eru mitt í arbeiðslívinum í dag verða trælir á arbeiðsmarknaðinum til tey liggja á gravarbakkanum, um vit onki gera nú. Sosiala kontraktin við komandi ættarlið krevur av okkum, at tey, sum koma aftaná eisini verða lív lagað. Við skipanum, sum lofta teimum, sum eru slitin og troytt, fer at bera til at fara frá fyrr, um tørvur er á tí.

**Rakar ikki verandi pensjónistar**
Uppskotið um hækkandi pensjónsaldur rakar ikki verandi pensjónistar ella tey, ið eru um at gerast pensjónistar.
Uppskotið er, at pensjónsaldurin hækkar stigvíst frá 2034 til 2043. Í 2043 verður pensjónsaldurin 70 ár.
Tey fyrstu, sum vera ávirkaði av broytingini, eru tey, ið eru fødd í 1967 og 1968. Hjá teimum hækkar pensjónsaldurin við hálvum ári. Tey, sum eru fødd eftir 1972, fáa pensjón sum 70 ára gomul.

**Niðurslitin sleppa fyrr:** Tað hevur verið avgerandi fyri Javnaðarflokkin, at tey, sum av ymiskum orsøkum ikki megna at arbeiða til tey eru 70, skulu hava møguleikan at sleppa fyrr. Tey, sum eru slitin og troytt skulu – lætt og ómakaleyst - sleppa frá áðrenn pensjónsaldur. Vit hava framskundaða pensjón til tey niðurslitnu og tíðartreytaða pensjón til tey, ið hava havt eitt langt lív á arbeiðsmarknaðinum. Tað er avgerandi fyri Javnaðarflokkin, at vit hava skipanir, sum lofta teimum, sum ikki megna. Vit skulu lyfta, so vit kunnu lofta!

**Samanbering við Danmark:** Samanbera vit við Danmark, so hækkar pensjónsaldurin væl skjótari har. Longu í 2035 – tá okkara pensjónsaldur hækkar við trimum mánaðum, verður hann 69 ár í Danmark. Og hann hækkar meira enn tað.

**Um breiðar semjur:** Vit høvdu ynskt, at breið semja fekst um uppskotið. Tað hevði verið rættast. Men andstøðan hevur tilvitað valt lættastu loysnina – tað óbúnu loysnina – populistisku leiðina. Vit kundu valt tað sama. Men støðan er tíverri so átrokandi nú, at vit kunnu ikki loyva okkum at seta vælferð fólksins í vága.

**Vit tryggja vælferðina:** Tí tað verður ongin vælferð um fá ár, um vit ikki taka tøk at fáa búskapin á rætt – tryggja langtíðarhaldførið, so okkara børn og barnabørn eisini fáa ágóðan av at liva og virka í heimsins tryggasta og ríkasta samfelag.
Fakfelagssamstarvið sigur í fráboðan, at: "Pensjónsaldurin er áður hækkaður og hóast mótmæli, varð tann broytingin framd. Við ætlanini um enn eina hækking verður tryggleikin í ellisárum skryktur undan borgaranum." Vit siga: Tryggleikin batnar, tí vit tryggja fólkapensjónina, men aldursmarkið verður broytt. Tey, sum gerast pensjónistar um 10 ár, skulu eisini kenna seg trygg og tryggjast virðilig ellisár.

**Fáa ung at flyta heim:** Tað verður trupult at lokka okkara ungu heim til Føroyar um vit ikki skapa grundalag fyri einum haldførum búskapi og vælferðartænastum á støði við tær donsku. Inntøkustøðið og skattatrýst og arbeiðsmøguleikar eru umráðandi, skulu tey flyta heim - saman við progressivum og modernaðum politikarum.

**Tað forpliktar at vera Javnaðarflokkur**
Javnaðarflokkar í øllum norðurlondum hava tað í sínum skjaldrarmerki, at teir eiga at sita við valdið. Tí teir vilja sita við kring borðið, har stóru samfelagsbroytingarnar verða framdar. Reformsiðvenjan er alneyðug at tryggja og menna samfelagsbygnaðin, so hann allatíðina er lagaður til tíðartørv, -krøv og umstøður annars. Summi rópa okkara flokkar fyri teknokratiskar. Hetta er ikki heilt ósatt. Tí politiskar avgerðir mugu takast við støði í vitan, eins væl og hugsjón. Framskrivingum. Hagtølum. Útrokningum.

Vit eru ikki sett í verðina fyri at loysa ella varðveita okkara støðu í ríkinum. Vit eru heldur ikki sett í verðina fyri at renna ørindi fyri yvirklassan. Vit eru sett í verðina fyri at tryggja menniskjunum frælsi. Eisini fyri tey, sum ikki fingu besta útgangsstøði við heim av føðideildini. Frælsi frá fátøkt, trælkan og kúgan. Bert við at standa saman - við sosialum og solidariskum skipanum - har vit lyfta í felag - byggja og tryggja vit sosialar samfelagssúlur, fáa øll somu møguleikar at liva og virka, óansæð upphav ella uppruna.

**Áheitan**

Tað er eingin loyna, at tað brýtur í bæði borð hjá okkum í løtuni. Kommunuvalið var buldraligt á ymsan hátt, tað stendur á at fáa meiriluta fyri at fremja nøkur sentral vallyfti, og ætlanin um øðrvísi skatting av fólki, sum arbeiða uttanlands, skapar órógv. Mótstøðan verður stór frá teimum, sum ikki vilja taka ábyrgdina á seg. Her eru "bílig poeng" at fáa. Men hetta er ábyrgdarfult og neyðugt at gera, skulu vit tryggja vælferðina framyvir eisini. Og vit hava samtykt ætlanina á floksleiðslufundi - tvær ferðir.